# Tendra jólatræið í Havn leygardagin



*Jólatræið á Vaglinum í Havn verður tendrað leygardagin. Jólatrøini á Argtjum, á Hvítanesi, í Kaldbak, í Norðradali og í Kollafirði verða tendrað leygardagin í næstu viku*

**Jólatræið á Vaglinum í Havn verður tendrað komandi leygardag**

JÓLATRÆ
*Tíðindaskriv*

Havnar Hornorkestur fer at spæla, tá jólatræið á Vaglinum í Havn verður tendrað leygardagin kl 15:30. Bjarni Bæk, dómpróstur, og Jan Christiansen, býráðsformaður, fara at halda røðu.

Aftaná syngja Ung Stjørnuskot á Glade Hjørn.

Jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, í Kaldbak, Norðradali og Kollafirði verða tendrað vikuskiftið eftir, sigur Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni í Havn.









*Fleiri av kendu listafólkum okkara sýna fram í Gallerie Focus hjá Marionnu Norðoy í Havn í jólamánaðinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fleiri sýna fram í Gallerie Focus

**Frá 29. november til 21. desember hevur Galerie Focus í Havn, sum Mariannu Norðoy rekur, framsýning við ymiskum listafólkum**

LIST
*Tíðindaskriv*

Við á framsýningini eru eitt nú Bárður Jákupsson, Janus Kamban, Elinborg Lützen, Olivur við Neyst, Amariel Norðoy, Jóna Rasmussen, Eyðun av Reyni, Ingálvur av Reyni og Kári Svensson.

Galerie Focus, sum liggur í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn, lat upp fyrstu framsýningina 19. juli í ár og hevur higartil havt fimm separatframsýningar. Tey, ið hava sýnt fram myndlist eru: Bárður Jákupsson, Eyðun av Reyni, Jóna Rasmussen, Amariel Norðoy og Zacharias Heinesen. Framsýningarnar í Galerie Focus hava verið sera væl vitjaðar av fólki um alt landið og av ferðafólki.

Næsta ár er ætlanin at hava seks framsýningar við einstøkum listafólkum og tvær framsýningar við ymiskum listafólkum, soleiðis:

28. febr. - 14. mars:
Torbjørn Olsen og Andrias Andreassen
28. mars - 11. apríl:
Kári Svensson
30. mai - 13. juni:
Anker Mortensen
1. - 18. juli:
ymisk listafólk
1. - 15. august:
Marius Olsen
7. - 21. november:
Olivur við Neyst
2. - 19. desember:
ymisk listafólk

Framsýning í Galerie Focus er opin týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18, leygardag kl. 16 til 18. Fernisering til separatframsýningar er fríggjadag kl. 16 til 18

# Jólahugni í Viðarlundini

JÓLAHUGNI
*Tíðindaskriv*

Árligi jólahugnin í Viðarlundini verður komandi sunnudag, 1. sunnudag í atvent.

Tiltakið byrjar kl. 14 og heldur á til kl. 16.

Her verður møguligt at keypa dekoratiónir. Heldur tú tað vera stuttligari at gera dekoratiónirnar sjálvur, so kanst tú keypa tilfar at taka heim við tær.

Kakao og okkurt afturvið fæst til keyps.

Jólamenninir vitja og hava okkurt í posanum at geva børnunum.

Havnar Hornorkestur tekur eisini lut við jóla-tónleiki. Teir byrja at spæla kl. 14.15.

Ágóðin av tiltakinum fer til góðgerandi endamál.






